# ðarrák og lagasmíð





Myndir: Jens Kristian Vang

sert takkaði bólkurin fyri seg og fór av pallinum. Tá nógv varð klappað, komu teir út aftur, fyrst trummuleikarin, sum spældi trummisolo í fleiri minuttir. Síðan komu hinir og endaðu konsertina við tveimum løgum, og einum minni vekingarmøti. Gittarleikarin tók orðið. Hann bað tey, sum høvdu tørv á kristnari vegleiðing, um at fara inn í eitt rúm har vegleiðarar bíðaðu eftir teimum. Eyka trýst var lagt á tey, tá hann bað øll hini, sum vistu at doyðu tey nú, komu tey heim til Jesus, koyra hondina upp.



Andrias stóð enn og gløddi at Arna, og hóast hann millum løgini tosaði við áskoðararnar, tyktist hetta kunstigt, og einki samband varð veruliga. Arni Zachariassen harafturímóti hevði frálíkt samband við áhoyrarnar, og sum ein nýggjur Yngwie J. Malmsteen svingaði hann við gittaranum, hoppaði runt, lá á knæ og spældi og undirhelt fólkið.

### Fjøldin kókaði

Braquet gjørdust betur og betur, tá teir gjørdust heitari. Teir borðreiddu við fleiri heilt góðum løgum. Seinasta lagið hjá bólkinum var instrumentalt, og Arni fekk veruliga luft undir veingirnar. Tað var kanska ikki uttan orsøk, at tað varð í júst einum instrumentalum lag, at fjøldin kókaði mest. Teir vórðu róptir út at spæla umaftur. Sum eykalag spældu teir »All I want«, sum er eykalag á 15 teimum bestu hesa vikuna.

## *Hvat dámdi tær Petra?*



**Sámal, 32 ár Klaksvík**

Hetta var alvorliga gott. Eg eri glaður fyri, at teir spældu okkurt gamalt, eg havi lurtað eftir Petra nógv, men kenni best tað eldra.



**Hans Gunnar, 11 ár Havn**

Væl, mær dámdi væl. Alt var gott.



**Ása Sólbrún, Strendur**

Tað var øðiliga gott, alt var ordiliga kul.



**Lillian 24, Ljósá**

Mær dámdi væl konsertina. Deiligt at hoyra okkurt av tí gamla eisini. Kendi betur Petra fyrr, í 90'unum, kenni ikki tað nýggja so væl. Men tað var eisini gott.



**Jan Erik, 34, Leirvík**

Hatta var sera gott. Eg haldi, at tað er ótrúligt, at so gamlir menn syngja og spæla so væl. Hevði tú lurtað uttan at sæð teir, hevði tú hildið, at tað vóru ungir menn sum spældu.